# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 45 árum síðan:

## Realskúlaflokkur í 1964



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir fyri tveimum árum síðan skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn. Myndin her er tikin fyri umleið 45 árum síðan. Her eru realskúlanæmingar til fráfaringarnátturða heima hjá Frøken Cohr, flokslærara.

**Aftasta rað f.v.:** Torfinn Hansen, Kári Davidsen, Dagbjartur Johansen, Krisjan Dahl, Eivind Dalsgarð og Olaf Johansen.

**Miðraðið f.v.:** Anfríði Dam Jacobsen, Bogi Davidsen og Jógvan Christiansen.

**Fremst f.v.:** Herluf Lützen, Alan Brockie, Kristina Abrahamsen, Vigga Cohr (Frøken Cohr), Lis Djurhuus (Hammer) og Ása Sørensen (á Mýrini).

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024 (mynd nr. 485).

*Myndaeigari: Jógvan Christiansen*

# MERKISDAGAR

**Gullbrúdleyp**
12. jan. hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava Dagmar og Dávid Jacobsen, Norðagøtu silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fyri innbodnum á Hotel Føroyum 19. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda vit silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum í Klaksvík frá kl. 16. Julianna og Olivur Thomsen.

**75 ára føðingardagur**
Marita Arge Magnussen, Tórshavn, verður 75 ár 18. des. Dagurin verður hildin leygardagin 19. des. í Sjónleikarahúsinum frá kl. 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Ruth á Lakjuni, Fuglafirði verður 80 ár fríggjadagin 18. des. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 3. jan. verður Steingrim Joensen, Argjaboðagøta 32, Argir, 85 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum við fótbóltsvøllin á Argjum sunnudagin 3. jan frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagurin**
**17. desember. Albina**, deyð umleið ár 250. Ung kvinna, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum gjørdu silvurbrúdleypsdag okkara 24. nov. 2009 so sera hugnaligan og ógloymandi. Takk fyri gávur, blómur og heilsanir. Takk til Streingjakórið í K.F.U.M & K, sum vaktu okkum við sangi, og sum sungu til veitsluna. Takk til meinigheitina K.F.U.M & K fyri hjálpsemi. Annars vilja vit takka fyri alla ta hjálp, ið vit fingu á hesum stóra degi. Tykkum øllum verður ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranum signa nýttár.

**Kærar heilsanir Oluffa og Niels**